Vikuskiftis Sosialurin



## Skjal vakt stóran ans

Tá Danmark í 2002 gjørdi av at senda hermenn til Afghanistan at hjálpa amerikonsku deildunum har at fanga limir í Al-Qaeda, var danska stjórnin vitandi um, at tær amerikonsku deildirnar høvdu ikki skyldu til at geva fangunum ta viðferð, sum Genevesáttmálin ásetir. Tað vísir eitt skjal, sum júst er komið undan kavi í danska verjumálaráðnum. Skjalið hevur vakt stóran ans, og formaðurin í verjunevndini hjá Fólkatinginum, Hans Christian Thorning úr Vinstra, krevur eina frágreiðing frá Søren Gade, verjumálaráðharra. Tað ger andstøðan eisini.



## Mattrot í Ethiopia

ES samtykti í gjár at játta 10 milliónir evrur, sum skulu brúkast til at keypa neyðstøddum í Ethiopia mat. Herviligur turkur hevur herjað partar av Ethiopia og oyðilagt at kalla alla grøði, og tað hevur gjørt, at matvøruprísirnir eru farnir upp ígjøgnum, skrivar Reuters. Hjálparfelagsskapir siga, at meiri enn seks milliónir ethiopar hava ov lítið til matna og hava tørv á hjálp uttaneftir. ES hevur higartil í ár játtað knappliga 30 milliónir evrur til matvøruhjálp til Ethiopia.

# – Eg mundi bóltað rút



CHEF AID FØROYAR

**Hans Jákup Garðalíð trúði tí næstan ikki, tá hann frætti, at tónleikarar frá Múrinum ætla at siga mangatakk fyri góðan mat við stuðulskonsertini "Chef Aid", nú hann stendur eftir við einari stórari rokning**

FESTIVALUR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Hans Jákup Garðalíð, sum vanliga hevur ábyrgdina av kantinuni á Læraraskúlanum varð biðin um at taka sær av matinum til tónleikararnar á Múrinum.

- Eg fekk boð um at gera 167 verðar. Men tað endaði við, at eg gjørdi langt yvir 200. Og tað var sera góður matur og nógv gott at drekka, sigur Hans Jákup Garðalíð, við Sosialin.

### Stórur smeitur

Rokningin til fyriskipararnar var beint niðanfyri 100.000 krónur. Men hann hevur onki sæð til hendan pening, og missurin hevur verið ein stórur smeitur fyri fyritøkuna.

- Tað gongur ikki altíð, sum prestur prædikar, sigur Hans Jákup Garðalíð.

- Men vit megna hóast alt at reisa okkum aftur, roknar hann við.

### Líkar festivalar

Hann hevur sera nógv góð minni frá festivalum, har hann hevur borðreitt. Og hóast tað ikki endaði so gott, ætlar hann sær avgjørt ikki at nokta, verður hann biðin aftur.

- Eg minnist serliga, tá eg gjørdi mat til Smokie á "Summarfestivalinum". Teir vildu ikki reisa seg frá borðinum og eg havi altso á samvitskuni, at teir vórðu 45 minuttir ov seinir út á pallin, fortelur hann.

### Ovfarin av stuðlinum

Hans Jákup Garðalíð, er ovfarin av stuðlinum hann hevur fingið frá tónleikarunum, sum við framførsluni sunnukvøldið vilja siga manga takk fyri frálíka matin, teir fingu borðreiddan í Roykstovuni í Kirkjubø.

Hans Jákup Garðalíð ætlar sær at lurta eftir konsertini sunnukvøldið í Reinsarínum, men leggur aftrat, at hann nokk verður nakað smæðin.

**Hesir tónleikarirnir fara á pall sunnukvøldið í Reinsarínum**

200
Hallur Joensen
FAROE5
Sic
Guðrið Hansdóttir
Boys In A Band
MC-Hár, The Ghost
Lady Fire
Martin Joensen

# Tónleikarar siga manga takk sunnudagin

**Sunnudagin fara flestu føroysku tónleikanøvnini frá Múrinum á pall á Reinsarínum í Havn, til frama fyri kokkin, Hans Jákup Garðalíð, ið borðreiddi fyri teimum í Roykstovuni Kirkjubø. Tiltakið nevnist CHEF AID.**

TÓNLEIKUR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Fyriskipararnir av CHEF AID siga, at endamálið heilt einfalt er at at savna pening inn til tær ovurstóru rokningarnar, ið Hans Jákup Garðalíð situr eftir við, nú festivalurin er farin av knóranum.

- Vit eru øll samd um, at »við Múrin« var ein sera góð festivaluppliving, har umstøðurnar bæði á palli og handan pallin vóru óvanliga góðar. At koma yvir í Roykstovuna eftir framførsluna, og fáa eina slíka máltíð í hesum hugnaligu kørmunum, var fyri okkum ein stórur prikkur yvir i'num, sigur Niels Uni Dam, ein av fyrireikarunum.

- Serliga tí harmaði tað okkum øll at frætta, at kokkurin eftir húsagangin sjálvur stóð við rokningini fyri rávørurnar til matin og drykkivørurnar, ið hann hevði borðreitt fyri okkum, sigur hann.

Stigtakararnir til Chef Aid konsertina, ið eru limir í nøkrum av bólkunum, hava sett seg í samband við øll føroysku nøvnini á festivalinum, og móttøkan hevur verið sera jalig. Hjá onkrum bólki hava tó umstøður ikki verið til at luttikið, vegna tað, at fólk eru stødd uttanlands. Men talan verður um eina sera fjølbroytta konsert, tá 200, Hallur Joensen, FAROE5, Sic, Guðrið Hansdóttir, Boys In A Band, MC-Hár, The Ghost, Lady Fire og Martin Joensen fara á pall í sjónleikarhúsinum sunnudagin kl. 17.

- Vit kunnu jú altíð fara á pall aftur og fáa løn fyri at spæla somu løgini umaftur, men hjá kokkinum er støðan øðrvísi: Maturin er jú etin. Vit vilja tí gera okkara fyri at tryggja framtíðina hjá fyritøkuni hjá Hans Jákupi Garðalíð. Hann hevur í miðlunum boðað frá, at hesin missurin er størri enn tað, ið fyritøkan hjá honum klárar at bera. Hetta harmar okkum øll, tí hansara leiklutur á festivalinum var fyrst og fremst at gera okkara festivaluppliving enn betri.

- Hetta er okkara máta at siga manga takk, siga tónleikararnir í tíðindaskrivi.